TILTØK

Missiónshúsið í Skálavík
Felagskórið og manskórið úr oynni venur leygarkvøldið kl. 20 í Missiónshúsinum.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við sangi og vitnisburði.
Innsavnan verður til húsið.
Kl. 14 Sunnudagsskúli – seinasti innan summarfrítíðina.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Felags sunnudagsskúli verður í Vági.
Kl. 18 Møti við Sigrid, Jeannu og Mouritz. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Hósdagin kl. 19 Juniorsamling.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Magnus Jensen talar. Øll eru vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 3. juni
kl. 9.4-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan mikudagin, tlf. 316491
Týsdagin 4. juni
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Gamlar myndir.** Gerandismyndir uml. 600 ár aftur í tíðina. Ásmundur V. Johannesen.
Mikudagin 5. juni
Grundlógardagur stongt.
Hósdagin 6. juni
kl. 10.30-11 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 7. juni
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 2. juni verður gingið niðan á Strandafjall. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er miðaltungur. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

Eysturoyar Gongufelag
Gongutúrur verður sunnudagin 2. juni. Gingið verður úr Lamba út á Mjóvanes. Vit møtast á Lambareiði kl. 10. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni tlf. 449449 og 448860. Teldupostur:
infoey-r@post.olivant.fo
og infoey-f@post.olivant.fo

Vága Gongufelag
Um viðrar, fara vit túr sunnudagin 2. juni kl. 14 í Kjóadal, uttanfyri Sørvág. Byrjað verður úti í Geilini. Havið góð gonguklæði og kaffi við. Tilmelding á tlf. 213455.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tin stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 17.00 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirksifelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin tís- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

40-ÁRA STARVSDAGUR

Í dag, 1. juni hevur Hjørdis Olsen, Tórshavn, starvast á Føroya Gjaldstovu í 40 ár.

90 ÁR

Í dag, 1. juni verður Pauli Lave, fyrrv. snikkarameistari í Froðba, 90 ára gamal. Tey, sum vilja gleða hann við eini vitjan, kunnu støkka inn á gólvið ímillum kl. 14 og 17.

BRÚDLEYP

Í dag, leygardagin kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Mary Johannesen og Trygvi Hansen. Veitslan verður fyri innbodnum í B36-húsinum.

Í dag, 1. juni kl. 14.00 giftast í Filadelfia, Landavegur 22, Sóley Johannesen Klementsen, Tórshavn og Tór Arni Samuelsen, Søldarfjørður. Eftir vígsluna verður reseptión. Veitsla verður fyri innbodnum í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, kl. 19.00.

Leygardagin 15. juni kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Karin Carlsen og Jørgin Davidsen. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja á tlf. 447037, 217037 ella 254306 í seinasta lagi 8. juni.

Leygardagin 22. juni kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Anni Debess og Harry Benjaminsen, Toftir. Veitslan verður í B-68 húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, vinarliga sigið frá á tlf. 448139 ella 218139 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 13. juli kl. 14.00 giftast í Vestmanna kirkju Sussi Anette Flores Kristensen og Jóhannus á Rógvi, Vestmanna og Katrin á Rógvu og Dion Egge Hansen, Slangerup. Veitslan verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparini við at koma, kunnu ringja á tlf. 424151, 211851, 424305 ella 0045 47382815 í seinasta lagi mánadagin 1. juli.

Leygardagin 13. juli kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Valborg Silvurdal og Atli Djurholm. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma kunnu ringja á tlf. 0045 36726450 í seinasta lagi sunnudagin 2. juni.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 1. juni: Bodil Nielsen, tlf. 441490
Sunnudagin 2. juni: Andreas Petersen, tlf. 441086

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Jesur sigur í Luk. 12,20-21: Men Gud segði við hann: »Tín dári! Í hesi nátt verður sál tín heintað av tær; og hvør skal tá fáa tað, sum tú hevur vunnið?« v.21 Soleiðis gongst tí, sum savnar sær ríkidømi og ikki er ríkur í Guði«.

Mangan verður tikið til, at vit kunnu einki fáa við okkum í grøvina. Og rætt er tað, um vit her einans hugsa um okkara jarðiska góðs. Tí eingin okkara kann keypa sær pláss í himli.

Hóast hetta, so er tað ikki rætt, at vit einki kunnu fáa við okkum. Tí tað er nakað, sum deyðin ikki kann taka frá okkum og sum vit fáa við okkum, um vit eru rík í Gudi, og tað er hitt æviga lívið!

Tí er tað av størsta týdningi, at vit umaftur og umaftur undirstrika, at tað sum er avgerandi fyri lív okkara hinumegin deyðan, og hvat vit fáa við okkum, er okkara viðurskifti við Guð og støða okkara til hansara, meðan vit enn liva her á fold.

Tað avgerandi er, um vit hava givið lív okkara yvir í Guðs hendur. Tí so leingi vit liva her á fold, mega vit velja millum eitt lív í synd, sum endar í undirgangi, og eitt lív í Jesu fótasporum, sum endar í sælu og dýrd! Vit mega velja millum Guð og heimin, tí at vit kunnu ikki tæna tveimum harrum, Guði og Mammon, tí annaðhvrøt mega vit elska annan og hata annan ella halda okkum aftur at øðrum og vanviða annan.

Ein dag er okkara seinasta løta komin á okkara jarðiska lívi. Tí einki er vissari enn tað, enn at deyðin einaferð kemur til hvønn einstakan av okkum. Ja, ein kann næstan siga, at hann er ávegis. Tí hvør løta og hvør dagur á lívsleið okakra dregur okkum ein dag nærri deyðanum, ein dag nærri ævinleikanum.

Ein dári, sigur Jesus. Ein dári er ein, ið støðugt livir lív sítt uttan Guðs hjálp. Tað er ein, ið ikki roknar við Guði, tí sum sálmaskaldið sigur í sálma 141: »Í hjarta dárar siga: Ei nakar Guð er til!«

Tá ið Jesus sigur hesi orðini, sigur hann tey um ein ríkan, um sum átti alt, ið hann kundi hugsað sær. Akrar hansara vóru stórir og gróðurtungir, hann røkti jørð sína. Men fyri hann varð hansara jarðiska ríkidømi ein snávingarsteinur, sum fekk hann burtur frá Guðs ríkidømi. Ja, hann var uttan iva peningaliga ríkur, men tó andaliga fátækur. Alt hansara stríð og strev her á fold var til fánýtis!

Soleiðis gongur tað tí menniskjað, ið savnar sær jarðiskar skattir og sum ikki eigur Guðs ríkidømi, sum ikki eigur frelsuna í Jesusi Kristi.

Og soleiðis gongur tað eisini tí menniskjanum, ið ikki vil taka ímóti Guðs áminning, tá ið sagt verður: »Tín dári! Soleiðis gongst tí, sum savnar sær ríkidømi og ikki er ríkur í Guði«.

Skal lív okkara eydnast, og ikki hava verið til fánýtis, er tað avgerandi at vit eisini taka ímóti hesi áminning, soleiðis at vit kunnu fáa lut í frelsuni í Jesusi Kristi og fáa hitt æviga lívið við okkum tá við vit fara frá hesum foldarlívi.

Amen!

Hans Eiler Hammer, prestur

Stórur áhugi fyri summarlegunum

Summarið nærkast og harvið eisini allar tær mongu summarlegurnar, sum Heimamissiónin skipar fyri. Og tekningarnar streyma inn

SUMMARLEGUR
Tíðindaskriv

Fyri fyrstu ferð í nógv ár verður summarlega á Kambsdali. Umframt tað verða legur á Viðareiði, í Porkeri, í Sørvági, og 9 legur í Nesvík – 7 barnalegur og 2 ungdómslegur.

Á legunum er nógv áhugavert á skránni. Hvønn dag hava vit bibliutíma. Eisini verða ymisk spøl og kappingar á skránni. Vit fara at gera ítriv, og kanska verður eisini tið til onkra áhugaverda náttúruuppliving. Samstundis sum vit møta børnum úr øllum landinum.

28. juni byrja tær fyrstu summarlegurnar, og hóast tað er meir enn ein mánaður eftir, so eru fleiri av summarlegunum við at vera fullteknaðar. Lega nummar 8 í Nesvík er longu fullteknað, og onkur onnur er um at vera fullteknað. Men pláss eru enn eftir á flestu legunum á bygd og á teimum seinnu legunum í Nesvík.

Legan í Porkeri er flutt vegna jóansøkuna, so at hon byrjar mánadagin 1. juli og endar fríggjadagin 5. juli.

Búskaparfrøðingur ella roknskaparfólk til Fíggjardeildina

"Tað hevur einki uppá seg at fáa skil á útreiðslunum. Eg taki bara inntøkurnar og leggi 10% aftrat"

Bing Crosby



Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt. Hetta setur stór krov til fyritøkuna og starvsfólkini, herundir eisini til starvsfólkini í fíggjarøkinum.

Starvsfólk til Fíggjardeildina
Fíggjarøkið umfatar Avrokning, Bókhald, Goymslu og Fíggjardeild ella í alt umleið 30 starvsfólk. Til okkara Fíggjardeild, sum er stápsfunktión, ið beinleiðis vísir til fíggjarstjóran, verður søkt eftir einum búskaparfrøðingi ella roknskaparfólki at byrja 1. august ella skjótast gjørligt. Nýggja fólkið skal luttaka í menningini av fíggjarfyrisitingini og -stýringini av fyritøkuni.

Í Fíggjardeildini starvast fýra fólk, harav tveir búskaparfrøðingar. Tínar uppgávur vera saman við hinum starvsfólkunum á Fíggjardeildini at vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum:

· ársroknskapur og aðrir tíðarroknskapir
· fíggjarætlanir, uppfylging av fíggjarætlanum v.m.
· virkisøkisroknskapir
· gjaldførisuppgerðir
· viðlíkahald av annleggskartoteki, herundir uppfylging av íløgum
· skrivligar mannagongdir v.m.
· uppfylging av tryggingum
· ymsar ad hoc uppgávur

Vit kunnu bjóða tær at starvast í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

Tín førleiki
Tann, sum sett/ur verður, skal hava ella vera í holt við at enda hægri útbúgving innan búskap ella roknskap (cand. merc. aud., cand. merc. økonomistýring, cand. oecon, cand. polit, HD (R) e.l.) ella hava hollar royndir og førleika innan roknskapararbeiði frá liknandi størvum ella frá grannskoðara. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur

· hollan EDV-kunnleika
· góð samstarvsevnir
· evnir at arbeiða sjálvstøðugt
· fleksibul

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi kvalifikatiónunum.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, tlf. 303030, lokal 3297 (fartelefon 24 32 97) ella Jón Isaksen, lokal 3382.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juni 2002.

Umsóknir skulu sendast til:
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa allt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum!